Ársfrágreiðing 2014/2015

Aðalfundurin 19. mai 2015

Ársfrágreiðing 2014/2015

Starvsnevndin
Í starvsnevndini sita teir av aðalfundinum valdu limir: Formaðurin/kvinnan og 4 limir.
Starvsnevndarlimir kunnu vera afturvaldir eina ferð.
Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.
Starvsnevndin hevur ábyrgd av dagliga rakstri felagsins, eins og hon hevur um hendi øll fíggjarlig viðurskifti felagsins.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánan, tó undantikið juli og desember.

Á fundi tann 22. mai 2014 skipaði starvsnevndin seg við Yvonnu Hjaltalin sum næstforkvinnu.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan seinasta aðalfund eru:
Tóra við Keldu, forkvinna
Yvonna Hjaltalin, umboðandi Samskiftisbólkin (afasi)
Anna Dahl Olsen, umboðandi medisinska bólkin
Jørmund Foldbo, umboðandi sálarliga/neurologiska bólkin
Gudny Benjaminsdóttir, umboðandi rørslubólkin.

Skrivstovan
Tóra við Keldu hevur verið forkvinna í Meginfelag teirra brekaðu síðan seinasta aðalfund. Á skrivstovuni starvast Ása Olsen, sum er dagligur leiðari. Diana Thomsen, ið var sett hálva tíð sum skrivstovufólk, er farin í annað starv, og hevur felagið sett Øydis Jacobsen sum fyribils skrivstovufólk fram til summarferiuna, og Guðrið Thomsen er reingerðarfólk á 7 tímar um vikuna.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víðfevndar. Serliga hevur nógv arbeiði verið orsaka av, at gomlu avlamisskeltini fóru úr gildi 1. mars og eisini tí, at nú kunnu fólk søkja um fylgjarakort. Tó meta vit, at tað mesta arbeiði við endurnýggjan av avlamisskeltum er liðugt áðrenn summarferiuna.

Eisini hevur nógv arbeiði verið viðvíkjandi hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum til fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymiskum slag. Men so vítt møguligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

ST- sáttmálin, skuggafrágreiðing, og annars arbeiðið eftirfylgjandi hevur fylt nógv síðan seinasta aðalfund, og er arbeiðið, sum MBF hevur gjørt, væl móttikin av politiska myndugleikanum. Eisini

merkja vit eina nógv størri virðing fyri felagnum gjøgnum hetta arbeiðið og eisini tað, at vit hava megnað at fáa ST nevndina at áleggja landsstýrinum tað, sum tey hava gjørt í niðurstøðunum, sum nú liggja á heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum.

Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2015 er 1,5 mill. Við støði í lóg um ítróttarvedding fær MBF tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2015 er 645.000 kr. Hesin peningur kemur bæði MBF og limafeløgunum til góðar. Eisini fær MBF umleið 60.000 kr. frá FUR til ungdómsarbeiði, sum allur verður beinleiðis brúktur til tiltøk í limafeløgunum fyri ung undir 30 ár. Hetta er tó seinastu ferð, at MBF fær stuðul frá FUR.

Fyri 2015 kemur felagið at fáa nakað av inntøku orsaka av fylgjara og parkeringskortum, men koma vit eisini at hava nakað væl av útreiðslum, bæði til lønir, prenting o.l. so tá avtornar, verður neyvan nakað yvirskot av hesum.

Býtislykilin
Sambært viðtøkunum hjá MBF, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin.

ST- sáttmálin
2014 varð nógv merkt av skuggafrágreiðing og annars arbeiðinum við ST sáttmálanum.
Í januar 2014 varð skuggafrágreiðingin send til ST, og vóru umboð fyri MBF í døgunum 14. og 15. apríl í Geneve og løgdu fram skuggafrágreiðing viðvíkjandi ST sáttmálanum um rættindi hjá teimum, sum bera brek. Framløgan var í Palais Wilson, sum er høvuðssætið fyri mannarættindi hjá ST. Hetta var ein serstakur møguleiki fyri MBF, og er hetta fyrstu ferð, at ein føroysk skuggafrágreiðing er skrivað og løgd fram.

Í september vóru somu umboð aftur í Geneve, har aftur varð høvið at hava eina framløgu fyri ST nevndini. Eisini høvdu vit í september fund við Martin Babu, sum hevði ábyrgd av Føroyum, Grønlandi og Danmark. Hesir fundir við Martin Babu vóru í nógvum førum tað, sum gjørdi, at ST nevndin fekk eina fatan av, hvat Føroyar er í mun til Danmark, og at alt, sum er í Danmark, ikki er á sama hátt í Føroyum. Í september vóru vit eisini til staðar, tá ið umboð fyri Føroya Landsstýrið vóru til próvtøku viðvíkjandi ST sáttmálanum.

Nú arbeiðið við skuggafrágreiðingini mótvegis ST nevndini er liðugt á hesum sinni, kunnu vit fegnast um, at tað eru rættiliga nógvar og tíðandi niðurstøður, sum eru komnar frá nevndini til Føroya Landsstýrið at fáa uppá pláss, áðrenn næsta frágreiðing skal gerast í 2019.

Tað, sum MBF eisini kann fegnast um er, at politiski myndugleikin, bæði samgonga og andstøða hevur tikið væl ímóti, tí arbeiði MBF hevur gjørt viðvíkjandi skuggafrágreiðing, list of issues og annars ST sáttmálanum.

Í løtuni er MBF við at gera uppskot til hvussu § 33 á sáttmálanum kann setast í verk í Føroyum.

Bústaðarviðurskiftir
Í løtuni hendir nógv á hesum økinum. MBF hevur havt tekningar til nýggjar íbúðir, sum Bústaðir skal byggja, til viðmerkingar, og hevur Jógvan Sofus Vágsheyg tikið sær av hesum arbeiði fyri MBF.

Sambýlið Eystan Heyg í Tórshavn varð tikið í nýtslu í november 2014. Nýggi depilin til børn og ung við fjølbreki í Runavík, sum skal avloysa dagstovnin og umlættingartilboðið Reiðri á Saltnesi, varð liðugur í desember 2014.

Í mai 2014 varð samtykt at byggja virknis- og umlættingardepil í Sandoy.

Almannaveitingar
Í juni 2014 var fundur millum MBF og umboð fyri Almannaverkið, har vit fingu kunning um royndarverkætlan við BPA.

Í september 2014 varð tilmæli um góðu tilgongdina handað. Landsstýrisfólkini í Almannamálum, mentamálum , heilsumálum og formaðurin í Kommunufelagnum vóru samd um at fremja tilmælini, sum arbeiðsbólkurin vísti á í "Tí góðu tilgongdini".

Tann góða tilgongdin" er ein skipaður samstarvsleistur, sum skal tryggja eitt dygdargott samskipað heildartilboð til børn við autismu og familjur teirra, har avvarðandi myndugleikar taka ábyrgd av sínum parti av tænastuni og taka ábyrgd at samstarva og samskipa tænastuna við aðrar myndugleikar.

Partarnir eru samdir um, at miða eftir, at skipanin, sum er lýst í tilmælinum, verður sett í verk 1. januar 2015, og at øll børn við autismu og familjur teirra frá 1.januar 2016 eru fevnd av hesi skipan. Semja er somuleiðis um, at skipanin skal endurskoðast í 2017."
Tann góða tilgongdin tekur útgangsstøðið í børnum, ið hava autismu, men ætlanin er, at mannagongdirnar skulu kunna brúkast í øðrum sambondum eisini.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2015 er játtanin til barnaískoyti, sum er barnagjald til stakar uppihaldarar, hækkað við 4 mió. kr. og fer barnaískoytið við hesum úr kr. 6.588,00 pr. barn um árið upp í kr. 10.000,00 pr. barn um árið. Endamálið við at hækka barnaískoyti er at geva støkum uppihaldarum og børnum teirra betri kor.

Viðvíkjandi persónum, sum koma í tillaga starv, hevur MBF havt fundir við Almannamálaráðið viðvíkjandi spurninginum um eftirløn/pensjón av tí partinum av løn, sum Almannaverkið betalur. Eisini hevur felagið havt samband við Fíggjarmálaráðið hesum viðvíkjandi. MBF hevur fingið at vita, at hesin spurningur verður tikin við í samband við aðalorðaskiftið nú í vár.

Uppskot hevur verið til hoyringar viðvíkjandi persónum, sum í heiminum uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, og sum kunnu við heimild í § 17, stk. 3 í forsorgarlógini fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Endurgjaldið er 100 prosent av mistu inntøkuni. Tó er eitt

hámark fyri endurgjaldi á 25.000 kr. um mánaðin íroknað frítíðarløn. Uppskot er um at hækka hetta hámark til kr. 35.000.

Arbeiðsmarknaður
Ása Olsen er stýrislimur í Dugna. Skúlin við Áir hevur nú broytt sítt virksemi, og er FHS útbúgvingin niðurløgd og orkan nýtt til ein fyrireikandi flokk.

Dugni er ein endurbúgvingarstovnur undir Almannamálaráðnum, sum er skipaður sambært viðtøkum frá 1. juli 2012. Endamálið hjá Dugna er millum annað at royna arbeiðsevnini hjá borgarum, ið eru vinnutarnaðir, og at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunnu fara til arbeiðis.

Visjónin hjá Dugna er, at øll sum fáa pláss á Dugna, skulu koma í útbúgving ella arbeiði.

Fountainhúsið: Endamálið er at stuðla eina áramálsásetta verkætlan at seta á stovn eitt arbeiðsrættað tilboð til persónar, sum eru sálarsjúkir ella hava sálarligar trupulleikar. Tilboðið skal skipast við Fountain húsi sum fyrimynd.

Miðnámsútbúgving
Tilmæli um serliga skipað miðnám til ung, varð handað 30.01.2015.
Tilmælið leggur upp til, at ein skipað tilgongd skal setast í verk frá komandi skúlaári, soleiðis at áleið 120 næmingar við serligum tørvi koma at ganga á serliga skipaðum miðnámsskúlatilboðum um fýra ár, tá ið skipanin er fult útbygd. Skúlatilboðini skulu samskipast við stuðulsfyriskipanum, sum næmingar hava tørv á eftir skúlatíð. Tískil verður lagt upp til neyvt samstarv millum Mentamálaráðið og Almannamálaráðið.

Komandi skúlaár verður ein nýggjur flokkur tikin upp á Studentaskúlanum í Hoydølum, fyri næmingar við autismu-spektrum órógv, og nýggj serbreyt til ung við serligum tørvi verður á miðnámsskúlunum á Kambsdali komandi skúlaár.

Rásin í Runavík kemur at taka upp næmingar á hvørjum ári, og verður tíðin hjá næmingum á Rásini stytt úr trimum árum niður í tvey ár.

Atkoma
MBF hevur samband við “Visit Tórshavn” viðvíkjandi atkomu. Tey hava gjørt eina verkætlan, har tey hava kannað atkomu møguleikarnar til marstøð og gisting fyri fólk, sum sita í koyristóli.

Arbeitt verður í løtuni fyri, at fara undir eina vesturnorðurlendska verkætlan innan atkomu til ferðavinnu.
MBF hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa sett á stovn skrivitulkaskipan. Hendan skipan kemur at verða partur av Teknmálstulkatænastuni, og eru í 2015 eru játtaðar kr. 400.000 til at seta ein skrivitulk og harvið byrja at bjóða hesa tænastu.

Fylgjara kort
Á seinasta aðalfundi var greitt frá, at MBF tá var í samráðingum við MMR og VMR, soleiðis, at fólk sum bera brek, kunnu fáa sama møguleika, sum eitt nú í Danmark, at fáa sonevnt fylgjarakort.

Hendan avtalan varð undirskrivað í desember 2015 og kom hon í gildi 1. januar 2015.
Í januar 2015 varð avtala undirskrivað við Smyril Line, sum nú eisini er við í fylgjaraskipanini, og 24. apríl undirskrivaðu kommunurnar avtalu um fylgjaraskipan.

HNR og NHR
MBF er limur í HNR. Ráðið hevur tveir fundir um árið, ein um várið og ein um heystið.

Eitt nýtt ráð hevur avloyst NHR, og er Carita Bjørklund umboð í hesum ráðnum, hon er vald fram til 2017, og er Ása Olsen tiltakslimur í ráðnum.

Lógararbeiði
MBF fær nógv lógaruppskot til hoyringar. Vit hava skipað lógararbeiðið soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, sum MBF fær til hoyringar, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava møguleika at gera sínar viðmerkingar. Í flestu førum eru tað ongi ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakrar viðmerkingar. Limafeløgini hava somuleiðis møguleika fyri sjálvi at senda sínar viðmerkingar beinleiðis til myndigleikan, sum varðar av lógaruppskotinum, og hendan møguleika eru tað nøkur limafeløg, sum brúka. Annars sendir MBF hoyringssvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið.

Formansfundir
Formansfundur var tann 20. september í Runavík í samband við Fólkafundin. Á hesum fundinum hevði Signe Højsten eina framløgu viðvíkjandi ST sáttmánum og hvussu sáttmálin kann brúkast í dagliga arbeiðinum í feløgunum.

Tann 19. november var aftur formansfundur, har Tóra við Keldu hevði eina framløgu um MBF nú og frameftir, nýggju heimasíðuna og FUR.

Onnur tiltøk
MBF luttók á Fólkafundinum, sum var 19. til 20. september 2014.

Tann 3. desember skipaði MBF fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum saman við Ráðnum fyri Brekað og AMR.

MBF blaðið
Í 2014 kom eitt blað út.
Blaðið snúði seg um ST sáttmálan og arbeiðið viðvíkjandi skuggafrágreiðing og framløguni í Geneve í apríl 2014. Eitt sokallað ST blað.

Tað er Rit & Ráð við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið.

Ætlanin er at geva tvey bløð út í 2015.

Heimasíðan
MBF fekk nýggja heimasíðu í september 2014. Tað er sera umráðandi fyri meginfelagið at hava eina virkna heimasíðu, sum umframt at verða virkin er nútímans.

Húsið
Í 2014 varð takið skift.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað
Formaðurin í MBF. Sum varalim fyri hana situr Ása Olsen, dagligur leiðari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen frá Blindafelagnum og Óli Wolles frá Javna sum varaumboð.

Ljóðbøkur
Margreta Næs hevur sitið sum MBF umboð í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur.

Ráðið fyri ferðslutrygd.
Herit Joensen, Vestmanna, situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

FUR- Føroya Ungdómsráð
MBF hevur tvey umboð í FUR. Umboðini hjá MBF eru Katrin Dahl Hanusardóttir úr Diabetisfelag Føroya og Alda Nielsdóttir úr Hjartafelagnum.

Serflutningsskipanin.
Ása Olsen, dagligur leiðari í MBF, situr sum MBF umboð og skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin.
Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Súna Mørk, limur í nevndini í Sinnisbata.